Hvivltenni seldur til Tallin

Rækjutrolarin Hvivltenni verður í næstu viku seldur til Estlands fyri umleið 50 milliónir krónur

JOHN JOHANNESSEN

Gongst alt sum ætlað, fær stásiligi føroyski rækjutrolarin, Hvivltenni, í komandi viku heimstað í Tallin í Estlandi. Skipið verður nevniliga selt til eitt reiðari við íslendskum og estlendskum partapeningi fyri 50 milliónir.

Kjartan Joensen, reiðari, sigur orsøkina til søluna vera, at ætlanin er at byggja nýtt og betri skip. Tó vísir hann á, at Hvivltenni er eitt tað besta av brúktu skipunum í Føroyum, men nýggir veiðuhættir gera, at neyðugt er við einum skipi við størri masinorku. Tískil loysir tað seg ikki at keypa eitt annað brúkt skip, men neyðugt er heldur at byggja nýtt.

Fiska við trimum trolum

Tað gerst alsamt meira vanligt hjá nýggjaru rækjutrolarunum at fiska við trimum trolum í senn. Hvivltenni varð fyri knøppum 15 árum síðani bygdur at fiska við einum troli, og tískil er maskinorkan eisini hareftir. Tó eru fimm ár liðin síðani skipið legði um til at fiska við tveimum trolum. Hetta hevur virkað væl, men ikki fer at bera til hjá Hvivltenni at fiska við trimum trolum. Hetta verður rætt og slætt ov tungt.

Tískil hevur Kjartan Joensen avgjørt at selja skipið og byggja nýtt. Men arbeiðið at projektera nýtt skip er tó ikki byrjað enn.

Vantandi politiskur vilji

– Tað er eitt ógvuliga tungt tak í Føroyum at fara undir at byggja nýtt skip. Føroyski fiskiflotin er, sum vit vita, niðurslitin, men tó sær ikki út til, at politiskur vilji er til staðar at stuðla einari endurnýggjan av fiskiflotanum.

Kjartan Joensen vísir á, at hann í trý ár hevur spurt seg fyri hjá Fiskimálastýrinum, um tað fer at bera til at fáa stuðul til bygging av nýggjum skipi, men haðani hevur hann hvørja ferð fingið sama svar.

– Svarið úr Fiskimálastýrinum hevur hvørja ferð verið, at arbeitt verður við at leggja fram eitt uppskot um endurnýggjan av fiskiflotanum, men enn er einki hent, sigur Kjartan Joensen, ið fýlist á, at myndugleikarnir leggja so lítið í høvuðsvinnu okkara, fiskivinnuna.

Kjartan Joensen er argur inn á, at ein partur av fullveldisætlanini snýr seg um at avhøvda fiskivinnuna. Hann heldur tað beinleiðis vera at vanvirða fiskivinnuna, tá tað alla tíðina verður tosað um at finna aðrar vinnur, meðan primervinnan verður gloymd.

– Eg má siga, at eg eri argur inn á Høgna Hoydal, men tó skilji eg hann, um hann er úr tí flokkinum í Hoydølum, ið kom til ta niðurstøðu, at fiskivinnan er ein trupulleiki fyri føroyska samfelagið, sigur ein speiskur Kjartan Joensen, ið vísir á, at neyðugt er at byggja nýtt skip, um fylgjast skal við.

Kjartan Joensen heldur orsøkina til politiska viljan vera ósemju millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Hann sigur, at tá Tjóðveldisflokkurin hevur eina ætlan, er Fólkaflokkurin ímóti, og tá Fólkaflokkurin hevur eina ætlan, er Tjóðveldisflokkurin ímóti. Hetta heldur hann vera orsøkina til, at tað ongan veg gongur politiskt í føroyska samfelagnum.

– Tað er eingin trupulleiki at fáa fígging til eitt nýtt skip, men trupult verður at gjalda hana aftur. Tí er neyðugt við fígging, sigur Kjartan Joensen, ið væntandi fer at handa estlendska reiðaríðnum Hvivltenni mikudagin. Skipið stendur í løtuni uppi á turrum hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Kjartan Joensen vil ikki siga, um nøkur skuld var í skipinum.

Hvivltenni, sum í næstu viku fær navnið Taurus, er bygur í 1985 á Langsten skipasmiðjuni í Noregi. Hann hevur 3 500 Bhk Mercedes Benz Maskinur og siglir 14,8 míl

Jørðin risti telduheimin

Tøkni: Jarðskjálvtin, sum skakaði Taiwan fyri viku síðani, hevur sett síni týðiligu spor gjøgnum telduheimin. Eisini í Føroyum merkist jarðskjálvtin, men tað er tí, at prísirnir á RAM eru næstan fýrafaldaðir upp á stutta tíð, og teir hækkað meira enn

Sveinur Tróndarson

Hóast jarðskjálvtin, sum var máldur til 7,6 á Rictherskalanum, rakti Taiwan í seinastu viku, so merkjast ristingarnar av jarðskjálvtanum eisini í Føroyum. Tær merkjast ikki við at føroyingar mugu sova á berajólum, men á tann hátt, at prísurin á RAM til teldur er farin "til himmals" um vit kunnu siga tað so.

Fyritøkur í Havn, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at tað er stórur munur á prísinum nú, og bara fyri tveimum vikum síðani. Og prísurin bara hækkar, siga tær báðar fyritøkurnar vit hava tosað við.

Føroyski útsøluprísurin á RAM var fyri umleið tveimum vikum síðani millum 700 og 800 krónur fyri 64 Mb RAM. Tær fáu RAM eindirnar, sum eru til at fáa hendur á í landinum enn kosta nu nærum 1.400 krónur.

Hesin prísurin fer tó ikki at halda siga fyritøkurnar vit hava tosað við, tí skal RAM bíleggjast úr Danmark í dag, so verður útsøluprísurin uml. 2.100 krónur fyri 64 Mb RAM

Sama skil er, um tú ætlar tær at keypa 128 Mb RAM. Prísruin var fyri tveimum trimum vikum síðani um 1.500 krónur, men skal hesin luturin keypast úr Danmark í dag, so er søluprísurin heilar 3.800 krónur.

Av báðum fyritøkum frætta vit, at hækkingin ikki er steðga enn, og at vit tí kunnu vænta, at sleppa at gjalda upp aftur meir fyri henda teldulut.

At hvør av øðrum liva má, kann staðfestast í hesum førinum.

Danska blaðið Computerworl skrivar um donsku teldufyritøkuna Memory Card, sum selur sokallaði DRAM lutirnar. Fyri heilt stuttari tíð síðani keypti fyritøkan fyri ikki minni enn 200 mió. krónur frá taiwanskum fyritøkum, men eftir jarðskjálvtan er virðið á gymsluni hækkað til 280 mió. krónur.

Stjórin í fyritøkuni váttar fyri Computerworld, at goymslan er upp á uml. 200 mió. krónur, men hann kann ikki siga, hvussu nógv fyritøka hansara hevur forvunnið upp á jarðskjálvtan.

Veruleiki er tað tó, at eitt standard DRAM-produkt, sum mánadagin fyri góðari viku síðani kostaði 13 dollarar eftir heilt fáum døgum var hækkað til 18 dollarar fyri eintaki.

Spurningurin er bara hvussu leingi henda støðan kemur at halda og hvussu leingi pprísurin kemur at halda sær har uppi. Jarðskjálvtin hevði tíbetur ikki tað við sær, at virkini á Taiwan vórðu javnaði við jørðina, men av tí at talan er um eina sera neyva framleiðslu, skulu øll tól innstillast av nýggjum, og tað tekur tíð, verður sagt í Computerworld.

Mett verður, at fyritøkurnar í Taiwan – tær eru fleiri – í alt sita á umleið 20 prosentum av heimsmarknaðinum av RAM.

Maskinan
við óteljandi møguleikunum
Kann brúkast bæði sum lessari/krani og gaffiltrukkur o.m.a.

O. K. HEILSØLA & MASKINUR
430 Hvalvík - Tlf. 422394